## Søguligur sunnudagur

Í gjár – sunnudagurin 22. juli – var síðsti sunnudagur, áðrenn Fólkakirkjan verður yvirtikin komandi sunnudag, ólavsøkudag tann 29. juli. Hetta setti eitt sindur av dámi á guðstænastuna í millum annað Dómkirkjuni, sum sostatt var síðsta guðstænasta, meðan kirkjuliga umsitingin enn er donsk. Tó varð dentur lagdur á, at orðini og Orðið framvegis verður tað sama, og hetta varð staðfest, tá kirkjufólkið endaði guðstænastuna við at syngja sálmin "Fedranna kirkja í Føroya tjóð".



## Kanna uppsøgn

Uppsøgnin av Johan Petur Davidsen skal kannast. Tað segði Útvarpið um vikuskiftið. Sambært teimum hevur lønardeildin í Fíggjarmálaráðnum tikið ávaringina ímóti fyrrverandi leiðandi yvirlæknanum á Landssjúkrahúsinum, Johan Petur Davidsen, aftur. Samstundis skal ein tænastumannakanning finna útav, um sjúkrahúsleiðslan hevði haldgóða grundgeving at siga Johan Petur úr starvinum sum leiðandi yvirlækna. Løgtingsins umboðsmaður kom í november til ta niðurstøðu, at Almanna- og heilsumálaráðið brúkti skeiva mannagongd, tá leiðandi yvirlæknin varð koyrdur frá.

# at byggja dingar



*Áðrenn arbeiðið við fyrsta nýbygninginum hjá Thor fór í gongd á Skála, gjørdu leiðslan á Skipasmiðjuni, Landsfelag Handverkaranna og Thor avtalu um fáa póllendingar til Føroya at sveisa bæði hendan og ein skrokk afturat. Her eru næstformaðurin í Landsfelag Handverkaranna, Eli Brimsvík, sum eisini er formaður í Havnar Handverkarafelag, og Gunnar Mohr, stjóri á Tórshavnar Skipasmiðju, avmyndaður á Skála í sambandi við sjósetingina*

Eli Brimsvík, formaður í Havnar Handverkarafelag.

Hann vísir á, at sjálvt um føroyingar ikki hava sveisað skrokkin, so hevur hetta givið nógv arbeiði til føroyskar handverkarar og arbeiðsmenn, ið annars ikki var til.

- Vit skulu ikki gloyma, at nógvir undirveitarar hava fingið handils- og arbeiðsordrar í sambandi við byggingina, sum bæði tryggjar okkara limun og limun í øðrum fakfeløgum arbeiði. Hetta sóu vit beinanvegin, og tí varð avtala gjørd millum Landsfelag Handverkaranna, Tórshavnar Skipasmiðju og Thor um póllendingarnar, sigur Eli Brimsvík, ið umframt at vera formaður í Havnar Handverkarafelag, eisini er næstformaður í Landsfelag Handverkaranna.

### Harðar atfinningar

Funnist var at landsfelagnum, tá felagið í fjør summar gjørdu sáttmála við Thor og Tórshavnar Skipasmiðju um póllendingarnar. Millum annað Ingeborg Vinther, forkvinna í Føroya Arbeiðarafelag, fanst hvassliga at handverkarafeløgunum fyri loyva slíkum. Eisini Føroya Handverkarafelag var ímóti avtaluni.

Spurdur um hvat póllendingarnir hava fingið í løn, sigur formaðurin í Havnar Handverkarafelag, at hann ikki kann siga tað nágreiniliga, men sigur seg vita, at úrtøkan hevur verið sera góð eftir pólskum mátistokki, og at tað er hetta, sum er avgerðandi, heldur hann.

Landsfelag Handverkaranna er meginfelag hjá handverkarafeløgunum í Havn, Tvøroyri, Vági, á Skála og hjá Føroya Prentarafelag. Hini feløgini eru limir í Føroya Handverkarafelag.



*Eins og allir aðrir á skipasmiðjuni vóru hesir ungu menninir vælnøgdir við úrslitið, tá Thor Alpha varð sjósett leygardagin. Vinstrumegin Marnar Súnason Kristiansen av Skála og Oluf Johannesen av Strondum*

# Skera stál til skrokk

**Longu langt áðrenn skrokkurin hjá Thor fór av bakkastokki í gjár vóru arbeiðsmenninir á skipasmiðjuni á Skála byrjaðir at skera stál til annan skrokkin**

SKIPABYGGING
*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*

Í gjár fór fyrsti nýbygningurin hjá Thor í Hósvík av bakkastokki á Skála, men hetta verður ikki tann seinasti. Longu nú eru arbeiðsmenninir á skipasmiðjuni byrjaðir at skera stál til systurskipið hjá Thor Alpha, sum verður navnið hjá hesum skipinum.

– Vit eru langt síðani byrjaðir at fyrireika byggingina av tí komandi skipinum við at skera stál, sum skal brúkast til at byggja tær ymsu sektiónirnar í skrokkinum, sigur Gunnar Mohr, stjóri á Tórshavnar Skipasmiðju, ið eigur skipasmiðjuna á Skála.

Hann sigur, at arbeiðið við fyrra skrokkinum er eitt sindur seinkað, men at teir rokna við at verða lidnir til ásetta tíð. Eftir ætlan verður veitingarskipið handað eigarunum í oktober og skal vera heilt liðugt í november, tá tað fer í vinnu í frálandavinnuni.

Eins og við fyrra skrokkinum eru tað eisini póllendingar, ið standa fyri sveisingini, meðan føroyingar standa fyri restini av arbeiðinum.

Formaðurin í Havnar Handverkarafelag, ið eisini er næstformaður í Landsfelag Handverkaranna, Eli Brimsvík, sigur seg vóna, at arbeiðið fer at ganga líka væl, sum við tí fyrra skrokkinum.

– Eg haldi, tað var rætt at gera avtaluna um póllendingarnar, tí tað hevur eisini givið okkara limun og limum í øðrum fakfeløgum meiri arbeiði, sigur Eli Brimsvík.

Veitingarskipini, sum eru 55 metrar til longdar, koma at kosta 75 mió. krónur hvørt.

Umframt at tað hava verið upp í 45 pólskir sveisarar á Skála, hevur verið arbeiði til 20-25 handverkarar og arbeiðsmenn. Tveir av teimum eru Marnar Súnason Kristiansen og Oluf Johannesen. Fyri fyrstnevnda er talan um eitt summarferiuarbeiði, meðan hann gongur á studentaskúla á Kambsdali. Hesir báðir hava ikki verið við til at gjørt vognin undir skipinum kláran í sambandi við sjósetingina.

– Tað kennist væl at vera farin undir at byggja aftur og stuttligt at síggja úrslitið í dag, siga teir báðir.